SUMMAR FESTIVALUR '04

# Hjarnar við kjarna staðfestu leiðsluna



*Hjarnar lótu frá fyrstu stund ongan iva vera um, at her var ein bólkur í toppformi*
*Mynd: Álv ur Haraldsen*

**Hjarnar hava verið í oddasessinum í føroyskum rock- og popptónleiki í 30 ár og á Summarfestivalinum í Klaksvík prógvaði bólkurin, at enn verða teir ringir at syfta av trónuni. Við bæði nýggjari og gamlari manning savnaðari á palli hevði Hjarnar eina orkuløddа framførslu, sum so avgjørt var millum tær allar bestu á festivalinum**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen,*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hjarnar hava í ár 30 ár á baki sum bólkur. Bólkurin arbeiðir við at fáa fløgu út fyrst í komandi árinum.

Og øll tekin eru um, at vit kunnu vænta okkum okkurt gott!

Hjarnar spældu á Summarfestivalinum í Klaksvík leygardagin og serligt var, at øll manningin í bólkinum var savnað - manningin í dag og manning fyri eini 15 - 20 árum síðani.

Jørgin Dahl og Graham Stewart vóru aftur á gomlum gøtum. Tá teir einaferð miðskeiðis í áttatiárunum fóru aðrar leiðir, kom Ólavur Øster upp í bólkin. Hesir, saman við Karl Martin Samuelsen, Jógvan Olsen, Eyðun Nolsøe og Hans Black, stóðu á palli, og so var fullmannað.

## Klárt á odda

Mong høvdu óivað hesa serstøku løtu, har kjarnin í bólkinum aftur var til staðar, sum eina yvirskrift til júst teirra festivalskrá. Jørgin Dahl hevur í stóran mun sett dám á føroyskan tónleik við frálíkum løgum, ið øll kenna, men hevur ikki verið nógv frammi síðstu árini, undantikið fyri fáum árum síðani, tá hann aftur gav fløgu út.

Og Hjarnar skuffaðu ikki. Dimmið hevði ikki lagt seg, tá Hjarnar kom á pall um 18 tíðina, og kanska kann vera trupult at skapa rætta huglagið í dagsljósi. Bæði millum áhoyrarar og tónleikarar.

Men Hjarnar lótu frá fyrstu stund ongan iva vera um, at her var ein bólkur í toppformi. Hjarnar er - enn sum áður - ein rockbólkur við góðum tónleikarum og góðum tilfari.

Orka var í framførsluni, so tað rættiliga merktist. Hóast nøkur still løg vóru á skránni, so eigur bólkurin so nógva orku og swing, og so nógv rættiligt rocktilfar við power í, at har var alt sum tað skuldi vera. Ljóðmyndin var eisini sera góð og tá Hjarnar í orkumiklum løgum rættiliga setti ferð á, so var veruliga talan um rock, ið blásti burtur allan iva og sum staðfesti, at teir eru enn í oddasessinum og at veteranarnir verða ringir at syfta av trónuni. Hesir menn hava verið við til at byggja upp søguna um Klaksvík, sum tónleikahøvuðsstað Føroya. Spurningurin er nú, um teir ikki staðfestu bæði seg sjálvar og hesa søguna leygardagin. Í hvussu er fingu vit at vita eina av orsøkunum til søguna.

## Nýtt og gamalt

Tað er einki yvir at dylja, at Jørgin Dahl eigur heiðurin av nógvum góðum tilfari. Saman við Hjarnar og í øðrum bólkum.

Men Hjarnar hava hildið á uttan henda úrmæling og hava klárað seg væl. Løg hjá Karl Martin og øðrum eru frálík.

Stuttligt var tó at lata nostalgiina koma til sín rætt og hoyra gomlu løgini. Bæði av singleplátum og frá LP'ini We Come For You.

At hoyra Jørgin og Karl Martin syngja hvør móti øðrum og at hoyra Jørgin spæla Moog. Tað er hóast alt ikki so ofta, vit hoyra hetta longur og vit kenna og okkum dámar so væl hesi instrumentalløgini og tey eru og mugu vera við júst hesum serstaka ljóðførinum.

Breaking my Heart og aðrir "sjelarar" komu eisini til sín rætt. Breaking my Heart er óivað ein hin vakrasta rockballadan í føroyskum tónleiki. Men eisini nýggjari løg komu til sín rætt og eiga avgjørt sítt heiðurspláss, t.d. Í alla Nátt og so eitt nýtt lag - ongantíð áður framført - sum Hjarnar leikti so inniliga. Stilt og vakurt, so sum bert ein rættiligur rockbólkur kann framføra tað.

Allir tónleikararnir prógvaðu seg og bólkin. Karl Martin sang sera væl og tyktist at vera í toppformi. Bassur og trummur prógvaðu, at talan var um menn við røttu "tyngdini" og við royndum. Mest av øllum prógvaði Ólavur Øster tó, at - hóast hann hevði goymt seg aftast - so er og verður hann Øster. Ein rockguitari, sum swingar og ljómar sum eingin annar og solospølini fingu fleiri tónleikarar á Vágsbø at gevast við at trampa við stórutá, men ístaðin standa undrandi við hálvopnum munni í undran og virðing.

Tá Jørgin og Karl Martin so sungu Komið øll við og Hjarnar spældi við fullari ferð og setti eitt flott punktum, so var framførlan í hæddini og tey nostaligisku høvdi eisini fingið sítt.

Hjarnar høvdu eina framførslu, sum var super! So einfalt kann tað sigast. Har var orka og ferð á. Har var tað stilla og yndisliga. Ljóðmyndin gjørdi, at verkið gjørdist fullkomið.

Kjarnin í bólkinum kom saman og Hjarnar staðfestu bert, at enn eiga teir leiðsluna og teir verða ringir at taka. Framførslan var so avgjørt millum tær allar bestu á festivalinum, og tað sigur hóast alt ikki so lítið.



*Stuttligt var at hoyra Jørgin og Karl Martin syngja hvør móti øðrum og at hoyra Jørgin spæla Moog*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Meira frá festivalinum…**

*Í mikudagsblaðnum hjá Sosialinum verður meira tilfar frá Summarfestivalinum 2004 í Klaksvík*



# Algurnar á Funningsfirði eru óskaðiligar

**Karina Nolsøe, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni, sigur, at algurnar, sum um dagarnar blómaðu upp á Funningsfirði, eru væl kendar í Føroyum, og tær eru ikki eitrandi**

ALGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Allur innari partur av Funningsfirði var reyður av algum sum eftir eitt grindadráp í vikuskiftinum.

Hans Pauli Hansen, sum býr í Funningsfirði, segði við Útvarpið, at hann ongantíð áður hevur sæð Funningsfjørð so reyðan av algum áður.



## Kendar algur

Fiskirannsóknarstovan hevur nú kannað algurnar, og Karina Nolsøe veit at siga, at talan er um tvey kend algusløg, nevniliga myrionecta rubra og scrippsiella trochoidea, harav nøgdirnar av fyrrnevnda slagnum eru nógv størri enn av hinum.

Men bæði sløgini kunnu lita sjógvin reyðan.

– Hetta eru vanligar algur í Føroyum, og tær blóma javnan, tá ið umstøðurnar eru tær røttu.

Karina sigur, at nevndu algurnar á ongan hátt eru eitrandi, og einki er til hindurs fyri eta fisk ella skeljadjór av Funningsfirði – heldur ikki í hesum døgum.

## Algan doyr

Hon vísir á, at sambært kanningunum, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt, er ein góð miljón algur fyri hvønn litur av sjógvi, og tað er rættiliga nógv, men ikki ókent, tá ið umstøðurnar eru til tess.

– Algur er eitt náttúrligt fyribrigdi, sum serliga tekur seg upp um summarið.

Hon væntar, at algurnar og reyði liturin á Funningsfirði verður burtur, tá ið hendan vikan fer at halla.

Karina sigur, at algan doyr og fellir aftur á botnin, har hon verður umgjørd til ymisk lívrunnin evni.

– Tá ið slík fyribrigdi eru, sum í hesum førinum, er talan um sonevndar sporar sum liggja í botninum, og tá ið so umstøðurnar eru tær røttu, kemur gongd í. Hesir sporar virka í so máta sum fræ, sum gongd kemur í, sigur hon.

Karia Nolsøe sigur, at algurnar kunnu flyta seg við egnari hjálp, men í fyrsta lagi er tað rákið sum avgerð, hvønn veg tær flyta seg.

Nú enn bíligari

Føroyar Danmark

Keypmannahavn
Billund

Galdandi frá 06.09.2004 til 30.10.2004

**Vikuskiftisferðaseðil**

Bílegging áðrenn 16/10 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%. Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 5 dagar (Billund 3 dagar). Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

**1.490,-**

Íroknað ferðing fram/aftur. Ferðaavgjald (sí niðanfyri) og avgreiðslugjald á kr. 220,- kemur aftrat prisinum.

**Apex-ferðaseðil**

Bílegging áðrenn 16/10 2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%. Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

**1.980,-**

Íroknað ferðing fram/aftur. Ferðaavgjald (sí niðanfyri) og avgreiðslugjald á kr. 220,- kemur aftrat prisinum.

**Ferðaavgjald**

| Føroyar-Keypmannahavn fram/aftur | | Føroyar-Billund fram/aftur | |
|---|---|---|---|
| Vága floghavn | 130,- | Vága floghavn | 130,- |
| Føroya landsstýri | 120,- | Føroya landsstýri | 120,- |
| Kastrup floghavn | 52,- | Billund floghavn | 78,- |
| Danski staturin | 75,- | Danski staturin | 75,- |
| **Tilsamans** | **377,-** | **Tilsamans** | **403,-** |

**Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways á 34 10 10, á www.atlantic.fo ella á tínari ferðaskrivstovu**

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355

**Annað útbjóðingarumfarið í Føroyum**

Lýsing eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á føroyska landgrunninum.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum lýsir hervið eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Økið, ið verður boðið út, liggur eystan fyri og sunnan fyri Føroyar.

Freistin at lata inn umsóknir um loyvi er mikudagin 17. november 2004 klokkan 12.00.

Aðrar upplýsingar og tilfar í sambandi við útbjóðingarumfarið, herundir kort yvir útboðsøkið og standardloyvi, fáast við at venda sær til:



**Oljufyrisitingina**
Brekkutún 1
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Telefon: 35 70 70
Telefaks: 35 70 75

Omanfyri nevndu upplýsingar eru eisini tøkar á heimasíðuni hjá Oljufyrisitingini, ið er á www.ofs.fo